# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Daniel Pauli Dalbø 75 ár



Sunnudagin 11. desember verður pápi okkara Daniel Pauli Dalbø 75 ár. Pápi er føddur og uppvaksin í Syðrugøtu sum einasti beiggi av 7 systkjum. Hann var bert 14 ára gamal, tá tey mistu pápan og bleiv hann maðurin í húsinum, um man kann siga so. Eftir loknan 7. flokk gjørdi pápi ymiskt fyrifallandi arbeiði, áðrenn hann fór at læra til timburmann. Hann arbeiddi síðan sum timburmaður í nøkur ár, og eru tað ikki so fá hús, hann hevur verið við til at byggja.

Fyrst í 60'unum fór hann á Tøtingarvirkið at arbeiða, og var hann har í samfull 23 ár, øll árini sum arbeiðsformaður. Sjálvt um skúlagongdin ikki er tann stóra, so kláraði hann seg ótrúliga væl, tá fremmandafólk kom á gátt á Tøtingarvirkinum - tað var líkamikið um tað vóru danir, amerikumenn, fransar ella russar, so kláraði hann at samskifta við tey.

Sjálvt um sjónáttúran ikki er tann besta, fór pápi at royna sjólívið, og var hann nakrar túrar við Jupiter í 80'unum, men tá so Landsverkfrøðingurin sendi boð eftir honum, gjørdist hann "landkrabbi" aftur, og var hann í starvi hjá hesum stovni til hann fall fyri aldursmarkinum hjá tí almenna.

Síðan tá hevur hann verið í starvi hjá Aluplast í Norðragøtu. Hann trívist best tá okkurt er at takast við, og evnunum bilar onki - hann er raskur sum fáur og sterkur sum ein bjørn.

Pápi hevur eisini verið virkin á øðrum økjum og er tað enn. M.a. hevur hann verið deknur síðan 1972 - tey fyrstu 20 árini var hann einsamallur, men síðan nýggja kirkjan varð bygd, eru tey 3 sum skiftast. Hann hevur sitið í kirkjuráðnum, stýrinum fyri missiónshúsið, verið formaður í Samhald, sitið í skúlanevnd og øðrum álitissessum við.

Í frítíðini dámar pápa væl at verða í náttúruni. Sum yngri var hann í fleiri ár røktingarmaður og hevur hann altíð havt stóran alsk til djór yvirhøvur - sjálvur hevur hann bæði seyð og gæs, sum hann gongur høgt uppí.

Í 1957 giftist pápi við mammu okkara Sannu av Toftum og kunnu tey sostatt um lív og heilsa verður, halda gullbrúdleyp um 2 ár. Mamma hevur øll hesi árini verið pápa og okkum 6 systkjum ein hollur stuðul. Í dag eiga tey 21 abba- og ommubørn, sum tey ganga uppí við lív og sál. Vit systkin við familju vilja við hesum fáu orðum ynskja tær pápa hjartaligu tillukku við hesum stóra degi, við ynskjum um eina ríka framtíð. Eisini takka vit tær og mammu fyri alt tit eru fyri okkum.

Heilsan

**børnini**

### Dagurin í morgin

**9. desember. Rólvur.** Teir vita einki halgimenni at navni Rólvur ella Rudolf. Komið upp í álmanakkan í 1727. Navnið er týskt, sett saman av *hrodr*, ið merkir heiður og *wulf*, ið merkir úlvur.

## Tøkk

Vit vilja á henda hátt takka hjartaliga øllum sum mintust okkum á Diamantbrúdleypinum.

Takk til tykkum mongu, sum komu inn á gólv í Frelsunarherinum.

Takk fyri gávur, telegrammir og uppringingar.

Ikki minst takk til tykkum, sum stákaðust og gjørdu dagin so hugnaligan.

Guð signi tykkum øll.

**Elly og Frederik Joensen**
**Vágur**

## Jógvan Nybo 50 ár



Í gjár, mikudagin 7. desember, fylti Jógvan Nybo á Viðareiði 50 ár. Hann hevur nógvu tey seinastu árini verið ein av teimum, sum rættuliga hava verið í andglettinum. Bæði sum bygdarráðsformaður á Viðareiði og sum formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Jógvan er viðoyingur. Foreldrini vóru Hanna fødd Simonsen og Hans Pauli Nybo. Hanna var fødd í 1924 og doyði í 2003, og Hans Pauli var føddur í 1919 og doyði í 1992.

Ættarnavnið kom til Viðareiðis við abbanum Jógvani, sum var ættaður av Hvítanesi. Hann var húskallur Eysturi í Búð, og hann giftist Jóhonnu, sum var ættað úr Múla, og sum hevði bakað hjá Frants Restorff í Havnini, áðrenn hon kom á Brekkumørk, har hon eisini bakaði.

Hanna og Hans Pauli fingu tvey børn. Jógvan er føddur í 1955, og Kristina, sum eisini býr á Viðareiði, er fødd í 1962.

Jógvan lærdi maskinsmíð í Samsonar smiðju í Klaksvík, har hann var avlærdur í 1978. Eftir at hava verið smyrjari við Nónhamri, tók hann í 1980 maskinistprógv í Klaksvík, og á sumri í 1982 leyk hann maskinmeistaraprógv í Havnini.

Eitt stutt skifti í 1982 var hann á Strond, har SEV setti nýggjan motor upp. Annars hevur hann verið í Strandferðsluni. Síðani eftir ársskiftið í 1983 hevur hann verið í føstum starvi. Jógvan hevur onkur skifti siglt um Leirvíksfjørð, Skopunarfjørð og Vestmannastund, men fyri tað mesta hevur hann siglt á Skálafjarðarrutuni við Trónda og Dúgvuni og um Suðuroyarfjørð. Eisini var hann við størru skipunum á Skotlands rutuni, sum Strandferðslan røkti í níti árunum, og sum var ógvuliga populer millum føroyingar.

1986-87 var Jógvan í Odense og tók víðkaða maskinmeistaraprógvið. Í fleiri ár var Jógvan maskinstjóri á gamla Smyrli, og nú er hann maskinstjóri á nýggja Smyrli. Í tí sambandinum var hann fleiri ferðir í Spania, har síðsta tørnið var tíggju vikur.

Á kommunuvalinum í 1992 varð Jógvan Nybo fyrst valdur í bygdarráðið á Viðareiði. Hann gjørdist bygdarráðsformaður beinanvegin, og hóast takið var tungt at lyfta kommununa burtur úr kreppuni, so var Jógvan bygdarráðsformaður í tólv ár. Hann er framvegis bygdarráðslimur, men arbeiðsumstøðurnar gjørdu, at hann eftir síðsta val bar seg undan møguligum formansafturvali.

Onkuntíð hevur ljóðað, at Jógvan hevur verið á veg upp á listan hjá Javnaðarflokkinum í Norðoyggjum til løgtingsvalið, men higartil hevur hann borið seg undan at fara upp í landspolitikk. Jógvan sigst fylgja væl við í øllum samfelagsviðurskiftum.

Í 1993 varð Jógvan valdur í nevndina í Maskinmeistarafelagnum, og har hevur hann - burtursæð frá 1998-2000 - verið síðani. Hann var formaður 1994-1998 og aftur síðani 2000. Í hesum sessinum hevur hann ofta verið í andglettinum, tá ið Maskinmeistarafelagið hevur verið í samráðingum við SEV, Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum og Reiðarafelagið, sum hevur nógvar sáttmálar við Maskinmeistarafelagið.

Jógvan ber orð fyri at vera sáttligur, álitisfullur, fyrikomandi, at hava gott minni og at vera ógvuliga treiskur og tilvitaður um, hvørja uppgávu tað er, sum hann skal røkja.

Í 1982 giftist Jógvan Elisabeth Lassen, sum er dóttir Grethu og Paula Lassen í Vági. Tey búgva mitt í bygdini, har Elisabeth, sum er útbúgvin kokkur, hevur matstovu. Børnini eru Ólavur føddur í 1981, Hansa fødd í 1988 og Pauli, sum er føddur í 1993. Ólavur siglir við Ågot, Hansa gongur í skúla í USA, og Jógvan, eigur ein trý ára gamlan abbason í Haraldsundi.

Jógvan eigur seks gyllin á Viðareiði, og stóran part av frítíðini røktar hann seyðin. Á Viðareiði ganga teir høgt upp í seyðahaldið og veðrarnar, sum um sumrarnar eru í feitilendum, og um tað liggur fyri, so roynir Jógvan á hvørjum ári at vera á lundafleygi.

50 ára føðingardagurin varð hildin í skúlanum á Viðareiði síðsta fríggjakvøld.

**J**

Charles Midjord, Farodane p/f:

## 25 ára starvsdag og ongan sjúkradag




Fríggjadagin 9. desember eru 25 ár síðan tann tá 20 ára gamli havnardrongurin Charles Midjord byrjaði í skrivstovulæru hjá Farodane. Hetta var í 1980, fáar mánaðar eftir at Farodane var flutt av Tinghúsvegnum í nýggj hølir í Brekkutúni uppi í Hoyvík.

Tá var meginvirksemið hjá Farodane framvegis heilsøla innan matvørur. Søla av skrivstovuinnbúgvi var kortini so smátt byrja tá og Charles kom at taka sær meira og meira av søluni av møblum. Tá felagið í 1987 heilt gavst við matvøruheilsøluni, kom Charles burturav at taka sær av møblasøluni.

Tað ger hann framvegis og hevur Charles sostatt verið við í stóru menningini av hesum týdningarmikla parti av virkseminum hjá Farodane, so fyritøkan ídag er vorðin ein av teimum førandi á hesum øki. Altíð fyrikomandi og við positivum hugburði hevur Charles vunnið felagnum nógvar trúfastar kundar, sum hann hegnisliga hjálpir og vegleiðir at innrætta skrivstovur, fundarrúm, móttøkur o.s.fr.

Nú Farodane flutti møbladeildina í nýggj høli á Smyrilsvegi, er Charles aftaná 25 ár í Hoyvík fluttur við oman á Háls og sum tann góði samstarvsfelagin hann er, verður heilt víst stórur saknur í honum í Brekkutúni.

Tá Charles fyri 5 árum síðan hevði 20 ára starvsdag, hevði eitt av bløðunum í hesum sambandi fingið frænir av sjáldsama eginleikanum hjá hesum manni, sum í samfull 20 ár á Farodane ongan dag hevði verið frá arbeiði vegna sjúku og skrivaði blaðið grein burtur úr hesum. Nú 5 ár seinri kunnu vit staðfesta, at hann framvegis ongan sjúkradag hevur haft. Tað munnu vera fá, um nakað, líknandi fordømi.

Uppskriftina uppá so vælsignaða heilsu vil Charles tó ikki út við. Men vit vita at hansara frítíðarítriv er dansur, flogbóltur og gongutúrar í fjall og haga. Í øllum førum kann hetta takast sum prógv um at nevndi ítriv í øllum førum ikki eru heilsuskaðandi ítriv. Charles býr á Kommansmýru saman við Elinborg úr Tórshavn.